## Tríggir nýggir sparkivallir í Klaksvík

Komandi vikuskiftið verða tríggir spakivallir tiknir almennt í nýtslu í Klaksvík. Talan er um sparkivøllin á Helnabrekku, á Norðoyri og við Tekniska skúla. Í hesum sambandi verður almenn móttøka á sparkivøllinum við Tekniska Skúla leygardagin klokkan 15.30, har umboð fyri FSF, KÍ, Klaksvíkar býráð og Treysti eru við til at greiða frá nýtslu og vónum teirra til nevndu vallir. Kommunan hevur útvegað lendið, steinsett og stoypt fundament. Síðani gevur Fótbóltssambandið umvegis UEFA stuðul við álegging av grasflíki og er annars vegleiðandi, hvussu slíkir vallir skulu gerast eftir ávísum leisti. Endamálið er at menna tey ungu í bóltspæli og annars at røra seg. UEFA hevði í 2004 50 ára føðingardag, og gjørdi tá av at fara undir nýggja verkætlan, fyri á tann hátt at varpa ljós á stovnanina av UEFA og ikki minst fyri at stimbra undir menningina av fótbóltinum kring alt Evropa.



# Ein skúladagur á Ziskatrøð

**Í hesum døgum eru Tanja Sørensen úr Hvannasundi og Durita Simonsen úr Klaksvík í starvsvenjing í Miðlahúsinum. Týsdagin vóru tær til arbeiðis í Klaksvík**

SKÚLI

*Orð&Myndir: Tanja Sørensen/Durita Simonsen*

Vit høvdu eina samrøðu við Signar á Brúnni, sum hevur starvast sum stjóri á Ziskatrøð í 3 ár. Vit spurdi hann millum annað um skúlan, og um skúlin var væl fyri.

Hann heldur, at skúlin ikki er væl fyri, men hann er nýtiligur. Hesi 3 árini sum stjóri, hevur hann gjørt nógv við at fríðka og hugna um skúlan. Hann leggur stóran dent á, at øll gera sítt besta.

Á skúlanum á Ziskatrøð starvast 43 lærarir og tvey starvsfólk. Har ganga umleið 400 næmingar. Vit spurdu eisini, um nógv gevast í skúlanum aftaná 9. flokk.

Her fingu vit at vita, at næstan øll halda áfram í valskúlanum. Í Ósaskúlanum, sum Ziskatrøð hevur gott samstarv við, halda tey flestu áfram við valskúlanum aftaná 9. flokk. Næsta ár fara Ziskatrøð og Ósaskúlin at samstarva um serundervísning.



*Ein genta úr ein av teimum yngri flokkunum. Tey sótu øll so fitt og skrivaðu. Ein mynd av einum púra vanligum tíma*



*Her hugnar framhaldsdeildin sær. Møblarnir hava tey sjálvi gjørt. Tey hava millum annað eisini fríðkað um stovunar*



*Hesi tvey sita og skriva føroyska mállæru, saman vit reystini av flokkinum*



*Vit gingu framvið eina stovu, har ið vit sóu ein lærara við einum guitara í hondini. Børnini hugnar sær við felagssangi*